# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya



Fyri tíðarskeiðið 18. oktober 2014 til 23. oktober 2015

# Felagsskapurin

Seinasta árið hevur starvsnevndin í Svimjisambandi Føroya verið hendan: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Eyðun Húsgarð, næstformaður, Anni á Hædd, skrivari, Sørin S. Djurhuus og Katrin Sørensen, nevndarlimir, umframt Dan Hjelm tiltakslimur. Samstarvið hevur verið fyrimyndarligt.

Svimjinevndin hevur ikki verið virkin í kappingarárinum 2014/2015. Vanligu uppgávur hennara hava tí verið røktar av starvsnevndini, umframt at Jon Hestoy fyriskipaði FM og NOM 2015.

Jórun Eið Johannesen tekur sær av útbúgvingum, men hevur hetta virksemi verið rættiliga avmarkað, farna árið. Eitt yvirdómaraskeið hevur verið, og nógv lívbjargingarskeið.

Í mastersnevndini sita: Eyðun Húsgarð, formaður, Torkil Mørkøre og John Olsen. Hendan nevnd tekur sær serliga av at fyriskipa FOMM, og varð hendan uppgáva væl røkt eisini til FOMM 2014.

Í dómsnevndini hava sitið Poul Nolsøe, formaður og nevndarlimir Hanna Jøkladal og Poul Poulsen. Poul Nolsøe bað seg undan í summar, og Hanna Jøkladal andaðist. Dómsnevndin hevur ikki havt nakað mál á skrá, men neyðugt er nú at velja nýggjar limir.

Djóni Dalsgarð er aðalskrivari í Svimjisambandinum, og hevur skrivstovan riggað væl. Eli Stakksund bað seg á seinasta aðalfundi frá sum kassameistari, og er Símun Michael Sørensen nú komin í hansara stað, við ágrýtni og nærlagni.

Kalendarafundurin fyri 2015/2016 varð hildin í ÍSF-húsinum hin 5. september 2015, og varð tá næsti eisini settur á skrá, at verða leygardagin hin 19. desember 2015.

ATLANTIC AIRWAYS

# Kappingarárið 2014-2015

## Føroyskar stevnur

### Reystastevna í Leirvík 25. oktober 2014

26 kappingar, 6 feløg, 126 íðkarar og 537 úrslit.

### HS-stevna í Gundadali 1. - 2. november 2014

34 kappingar, 6 feløg, 76 íðkarar og 439 úrslit. Besta úrslit gav 748 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 15:36.38 í 1500 frí.

**Føroyskt juniormet (25m)**

Signhild Joensen (2000) 2:19.80 í 200 rygg

### FOMM í Klaksvík 15. november 2014

15 kappingar, 4 feløg, 52 íðkarar og 154 úrslit. Besta úrslit gav 434 FINA stig.

### FS-stevna í Fuglafirði 29. november 2014

24 kappingar, 6 feløg, 118 íðkarar og 319 úrslit.

### HS-stevna í Gundadali 20. desember 2014

31 kappingar, 6 feløg, 78 íðkarar og 246 úrslit. Besta úrslit gav 656 FINA stig, tá ið Eyðbjørn Joensen (1996) úr Suðuroyar Svimjifelag svam 25.08 í 50 firvald.

**Føroyskt juniormet (25m)**

Eyðbjørn Joensen (1996), SuSvim 29.59 í 50 bringu

ATLANTIC AIRWAYS

## SuSvim-stevna í Vági 10. - 11. januar 2015

Hendan stevna varð avlýst.

## FLOT-stevna á Toftum 25. januar 2015

26 kappingar, 6 feløg, 138 íðkarar og 402 úrslit.

Hendan stevna skuldi eftir røttum vera 17. januar, men varð flutt vegna ivasamt veður.



## Ægir-stevna í Klaksvík 7. - 8. februar 2015

34 kappingar, 6 feløg, 98 íðkarar og 537 úrslit. Besta úrslit gav 790 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 7:59.51 í 800 frí.

**Føroyskt met og juniormet (25m)**

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 33.71 í 50 bringu

ATLANTIC AIRWAYS

**Hartil føroyskt met (25m)**

Cecilia Wigant Eysturdal (1996), Ægir 8:58.47 í 800 frí

**Hartil føroysk juniormet (25m)**

Sára Nysted (2001), SuSvim 1:06.74 í 100 blandað, 2:21.20 í 200 blandað, 5:00.78 í 400 blandað

Vár E. Eidesgaard (2001), HS 8:59.27 í 800 frí

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 1:13.93 í 100 bringu

Signhild Joensen (2000), Ægir 2:19.24 í 200 rygg

Róland Toftum (1998), SuSvim 2:22.11 í 200 bringu

## Reysta-stevna í Leirvík 21. februar 2015

Hendan stevna varð avlýst vegna vantandi dómarar.

## SuSvim-stevna í Vági 7. - 8. mars 2015

46 kappingar, 4 feløg, 60 íðkarar og 383 úrslit. Besta úrslit gav 699 FINA stig, tá ið Sára R. Nysted (2001) svam 2:04.81 í 200 frí.

**Føroysk juniormet (25m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:04.81 í 200 frí, 1:06.59 í 100 blandað, 4:59.32 í 400 blandað

## FLOT-stevna á Toftum 21. mars 2015

26 kappingar, 6 feløg, 98 íðkarar og 336 úrslit.

## HS-stevna í Gundadali 18. - 19. apríl 2015

34 kappingar, 6 feløg, 94 íðkarar og 547 úrslit. Besta úrslit gav 769 FINA stig, tá ið Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag svam 15:27.61 í 1500 frí. Stevnan var úttøkustevna til Oyggjaleikir

**Føroysk met og juniormet (25m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 8:55.42 í 800 frí, 2:19.78 í 200 blandað, 4:55.81 í 400 blandað

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 32.96 í 50 bringu, 1:12.38 í 100 bringu

**Hartil føroyskt met (25m)**

Jonna B. Thomsen (1996), Ægir 2:22.91 í 200 firvald

**Hartil føroysk juniormet (25m)**

Signhild Joensen (2000), Ægir 2:19.21 í 200 rygg

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:04.38 í 200 frí

## Meistarastevna fyri Ung í Klaksvík 1. - 3. mai 2015

38 kappingar, 6 feløg, 112 íðkarar og 727 úrslit. Besta úrslit gav 707 FINA stig, tá ið Sára R. Nysted (2001) úr Suðuroyar Svimjifelag svam 4:23.22 í 400 frí.

## Føroyameistarastevna í Tórshavn 14. - 16. mai 2015

80 kappingar, 6 feløg, 65 íðkarar og 633 úrslit. Besta úrslit gav 847 FINA stig, tá ið Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag svam 14:58.15 í 1500 frí.

**Føroysk met og juniormet (25m)**

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 32.70 í 50 bringu, 1:11.53 í 100 bringu

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 1:06.44 í 100 blandað

**Hartil føroysk met (25m)**

Jonna B. Thomsen (1996), Ægir 2:21.70 í 200 firvald

Óli Mortensen (1996), HS 2:03.69 í 200 firvald

Ægir kvinnur (1996) 4:18.66 í 4x100 blandað

**Hartil føroysk juniormet (25m)**

Róland Toftum (1998), SuSvim 2:21.33 í 200 bringu

Signhild Joensen (2000), Ægir 2:18.17 í 200 rygg

## Havsvimjing á Varmakeldu í Fuglafirði 6. juni 2015

Fuglafjarðar Svimjifelag skipaði fyri havsvimjing um vánna í Fuglafirði hin 6. juni 2015.

## Ólavsøkusvimjing í Tórshavn 28. juli 2015

Havnar Svimjifelag skipaði Ólavsøkuaftan fyri 400m havsvimjing fram við Molanum í Havn.

## Svimjing um Vánna í Klaksvík 22. august 2015

Ægir skipaði sum partur av Føroya Sjómannadegi 2015 fyri svimjing um Vánna í Klaksvík.

## Havsvimjing á Mentanardøgunum í Fuglafirði 29. august 2015

Fuglafjarðar Svimjifelag skipaði fyri havsvimjing um vánna í Fuglafirði hin 29. august 2015.

## HS-stevna á Argjum 19. september 2015

26 kappingar, 4 feløg, 56 íðkarar og 165 úrslit.

## SuSvim-stevna í Vági 26. - 27. september 2015

32 kappingar, 4 feløg, 79 íðkarar og 533 úrslit. Besta úrslit gav 679 FINA stig, tá ið Signhild Joensen (2000) úr Ægir við 2:15.64 setti nýtt føroyskt juniormet í 200 rygg.

**Føroyskt juniormet (25m)**

Signhild Joensen (2000), Ægir 2:15.64 í 200 rygg.

ATLANTIC AIRWAYS

# Altjóða stevnur

## ØKM í Kastrup 24. - 26. oktober 2014

Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag umboðaði Aalborg Svømmeklub á Eysturdonsku meistarastevnuni á stuttgeil 2014, og vann har gull í 400 og 1500 frí.

## VKM í Aalborg 24. - 26. oktober 2014

Alvi Hjelm (1996) úr Ægir umboðaði Esbjerg Svømmeklub á Vesturdonsku meistarastevnuni á stuttgeil 2014, og vann har silvur í 800 og 1500 frí, umframt bronsu í 400 frí.

## North Sea Swim Meet í Stavanger 7. - 9. desember 2014

Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag umboðaði Føroyar á North Sea Swim Meet 2014, og vann har gull við nýggjum stevnumeti í 800 frí, umframt gull í 400 frí finalu og 'superfinalu', og bronsu í 200 frí. Úrslitið í 800 frí varð skýrt besta avrik av monnum á hesi stevnu.

## DMK í Brønshøj 20. - 23. november 2014

Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjfelag umboðaði Føroyar á donsku meistarastevnuni á stuttgeil 2014, og vann har gull í 400 frí.

## Køge Open 21. - 23. november 2014

Jana B. Thomsen (2000) umboðaði saman við liðfelagum sínum Reysta á Køge Open 2014 , og vann har silvur í 100 frí, umframt bronsu í 50 rygg 'útskiljing'.

## HMS í Doha 3. - 7 desember 2014

Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag, Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag og Cecilia Wigant Eysturdal (1996) úr Ægir umboðaðu Føroyar á HM á stuttgeil 2014. Ferðaleiðarar vóru Rókur í Jákupsstovu og Malan Vitalis Bærendsen, og venjari Rui Magalhaes. Pál Joensen megnaði her at verða nr 4 í 1500 frí, við nýggjum føroyskum og norðurlendskum meti.

ATLANTIC AIRWAYS

**Føroyskt og norðurlendskt met (25m)**
Pál Joensen (1990), SuSvim 14:26.54 í 1500 frí

## Amsterdam Swim Cup 12. - 14. desember 2014

Óli Mortensen (1996) umboðaði Havnar Svimjifelag á Amsterdam Swim Cup 2014. Rui Magalhaes var venjari og ferðaleiðari. Óli megnaði her at svimja seg til bronsu í 800 frí og 5. pláss í 1500 frí.

**Føroysk juniormet (50m)**
Óli Mortensen, HS 15:51.66 í 1500 frí
Óli Mortensen (1996), HS 4:41.42 í 400 blandað

## NM/NJM í Upplands Väsby 12. - 14. desember 2014

Ásbjørg Hjelm (1999) og Signhild Joensen (2000) úr Ægir, Barbara Debes (2000) úr FLOT, Jana Thomsen (2000) úr Reysta, Maria Antoft (2000), Lív E. Eidesgaard (1999), Marius I. Gardshodn (1998) og Niels Nattestad (1998) úr Havnar Svimjifelag, og Róland Toftum (1998) úr Suðuroyar Svimjifelag umboðaðu Føroyar á Norðurlendsku JuniorMeistarstevnuni 2014, meðan Emma F. Nystrøm (1996) úr Havnar Svimjifelag, Victoria W. Eysturdal (1998) og Alvi Hjelm (1996) úr Ægir og Eyðbjørn Joensen (1996) og Høgni Simonsen (1995) úr Suðuroyar Svimjifelag umboðaðu Føroyar á Norðurlendsku Meistarastevnuni 2014. Venjarar vóru Petur Heðin á Fløtti og Jón Bjarnason, og ferðaleiðarar Thurid Kjærbo og Sørin S. Djurhuus.

Alvi Hjelm megnaði her at svimja seg til silvur í 1500 frí, umframt bronsu í 400 frí og blandað.

**Føroyskt met og juniormet (25m)**
Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 33.81 í 50 bringu

**Hartil føroysk juniormet (25m)**
Alvi Hjelm (1996), Ægir 4:26.12 í 400 blandað
Signhild Joensen (2000), Ægir 2:19.46 í 200 rygg
Landsliðsgentur (1999) 4:24.68 í 4x100 blandað

ATLANTIC AIRWAYS

## RIG 2015 í Reykjavík 16. - 18. januar 2015

Føroyskir svimjarar úr Havnar Svimjifelag, Reysti, Suðuroyar Svimjifelag og Ægir luttóku á Reykjavík International Games 2015, og vunnu har tilsamans 19 gull, 10 silvur og 11 bronsu.

**Føroysk met og juniormet (50m)**

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 34.77 og 34.61 í 50 bringu, 1:15.77 í 100 bringu, 2:44.46 í 200 bringu

**Hartil føroysk met (50m)**

Cecilia W. Eysturdal (1996), Ægir 2:08.02 í 200 frí, 4:30.47 í 400 frí

Óli Mortensen (1996), HS 2:09.45 í 200 firvald

**Hartil føroysk juniormet (50m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 1:00.17 í 100 frí, 2:28.56 og 2:27.91 í 200 blandað

Signhild Joensen (2000), Ægir 1:07.49 í 100 rygg

Róland Toftum (1998), SuSvim 2:29.49 í 200 bringu

## Danish Open fyri brekað í Esbjerg 6. - 8. mars 2015

Krista Mørkøre (1998) og Ragnvaldur Jensen (1989) úr Ægir umboðaðu ÍSB á Danish Open fyri brekað 2015, og vann Krista har silvur í 200 frí, 50 bringu, umframt bronsu í 100 bringu

## MOM Marseille 6. - 8. mars 2015

Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag umboðaði Føroyar á MOM Marseille 2015, og vann har gull í 400 og 1500 frí. Úrslitið í 1500 frí var nýtt stevnumet.

## Danish Open í Bellahøj 28. - 31. mars 2015

Føroyskir svimjarar umboðaðu á Danish Open 2015 Suðuroyar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, FLOT, Aalborg Svømmeklub og Esbjerg Svømmeklub. Pál Joensen vann gull í 800 og 1500 frí, umframt silvur í 400 frí, meðan Alvi Hjelm varð nr 4 í 400 blandað. Úrslitið hjá Páli í 800 frí var nýtt stevnumet.

**Føroysk met og juniormet (50m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:23.67 í 200 blandað, 5:14.65 og 5:13.91 í 400 blandað

**Hartil føroysk juniormet (50m)**

Vár E. Eidesgaard (2001), HS 9:24.35 í 800 frí, 17:58.03 í 1500 frí

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 59.67 í 100 frí

## IDM í Berlin 16. - 19. apríl 2015

Krista Mørkøre (1998) úr Ægir umboðaði ÍSB á 29. Internationale Deutsche Meisterschaft, og svam seg har 7 ferðir til persónlig met.

## Scottish Masters Championships í Glasgow 23. - 24. apríl 2015

Masterssvimjarar úr Havnar Svimjifelag luttóku á Scottish Masters Championships 2015, og vunnu har tilsamans 2 gull,  5 silvur og 2 bronsur. Eyðun Bærentsen vann gull í 100 og 200 frí, umframt silvur í 50 bringu og 50 frí, Jon Hestoy bronsu í 50 firvald, Tóra Bærentsen bronsu í 50 frí, og liðsvimjingar silvur í 4x50 frí fyri mix og 4x50 frí og blandað.




ATLANTIC AIRWAYS

## Bergen Swim Festival 23. - 25. mai 2015

Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag umboðaði Føroyar á Bergen Swim Festival 2015, og vann har eitt silvur í 400 frí. Eitt serligt bragd var her tá ið Pál í somu kapping megnaði at seta føroyskt met í 50, 100 og 200 bringu, ávegis til 5. skjótasta pláss av øllum í innleiðandi 200 bringu.

**Føroysk met (50m)**

Pál Joensen (1990), SuSvim 30.65 í 50 bringu, 1:06.40 í 100 bringu, 2:21.71 í 200 bringu

## Mare Nostrum í Canet 6. - 7. juni 2015

Ásbjørg Hjelm (1999) og Alvi Hjelm (1996) úr Ægir, Astrið Foldarskarð (1994) og Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag, og Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag umboðaðu Føroyar á Mare Nostrum stevnunum í Canet og Barcelona 2015. Í Canet vann Pál bronsu í 1500 frí.

**Føroyskt met (50m)**

Óli Mortensen (1996), HS 2:09.09 í 200 firvald

## Mare Nostrum í Barcelona 10. - 11. juni 2015

Sami hópur luttók á Mare Nostrum stevnuni í Barcelona, sum í Canet. Pál varð her nr 5 í 800 frí.

## Mare Nostrum í Monaco 13. - 14. juni 2015

Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag luttók hartil á Mare Nostrum stevnuni í Monaco 2015, og varð her nr 7 í 400 frí.

## Evropeiskir Leikir í Baku 23. - 27. juni 2015

Ásbjørg Hjelm (1999) og Signhild Joensen (2000) úr Ægir og Marius I. Gardshodn (1998), Maria B. Antoft (2000) og Lív E. Eidesgaard (1999) úr Havnar Svimjifelag umboðaðu Føroyar og LEN á hesum fyrstu Evropeisku Leikum, so at skilja at úrslitini í LEN-høpi vórðu skrásett sum Føroyar, meðan tey annars í EOC-høpi í Baku gingu undir LEN-flagginum. Ferðaleiðarar vóru Anni á Hædd og Rókur í Jákupsstovu, og venjari Petur Heðin á Fløtti.

**Føroyskt met (50m)**

Ásbjørg Hjelm (1999), Ægir 1:15.77 í 100 bringu

**Hartil føroysk juniormet (50m)**

Signhild Joensen (2000), Ægir 1:06.90 í 100 rygg, 2:25.14 í 200 rygg

## Oyggjaleikir á Jersey 29. juni - 2. juli 2015

Føroyska svimjilandsliðið á Oyggjaleikum 2015 vóru: Astrið Foldarskarð (1994), Lív E. Eidesgaard (1999), Maria B. Antoft (2000), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal Hestoy (1992), Marius I. Gardshodn (1998) og Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag, Ásbjørg Hjelm (1999), Jonna B. Thomsen (1996), Signhild Joensen (2000) og Alvi Hjelm (1996) úr Ægir, og Sára R. Nysted (2001), Eyðbjørn Joensen (1996), Pál Joensen (1990) og Róland Toftum úr Suðuroyar Svimjifelag.

Ferðaleiðarar vóru Eyðun Húsgarð og Randi Holm, venjarar Petur Heðin á Fløtti, Rui Magalhaes og Anna Kristina Eysturberg, og fysioterapeut Thurid Kjærbo. Hartil kom Dan Hjelm at virka sum dómsnevnd á stevnuni, tá ið hesin tørvur vísti seg vegna ósemju um eina kolldøming.

Føroyska landsliðið vann svimjistevnuna við 10 gullheiðursmerkjum, 10 silvur og 16 bronsu.

Eitt merkisvert við hesa stevnu, var hin góði liðandin sum bygdist í leypi av stevnuni, við slagsangi og stuðli til tey sum kappaðust. Serligt rós eigur Alvi Hjelm, fyri at ganga á odda og 'halda grýtuna í kók', eisini tær løtur tá ið vit ikki vóru so væl fyri í kappingini.

ATLANTIC AIRWAYS



**Oyggjaleikamet (25m)**

Pál Joensen (1990), SuSvim 14:57.73 í 1500 frí, 2:14.82 í 200 bringu, 4:21.55 í 400 blandað

Landsliðskvinnur (1994) 1:57.06 í 4x50 blandað

**Føroysk met og juniormet (25m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 2:02.60 í 200 frí, 2:18.78 í 200 blandað, 4:51.57 í 400 blandað

**Hartil føroysk met (25m)**

Pál Joensen (1990), SuSvim 1:02.80 í 100 bringu, 2:14.82 í 200 bringu

Jonna B. Thomsen (1996), Ægir 2:18.67 í 200 firvald

Landsliðskvinnur (1994) 3:54.02 í 4x100 frí, 1:57.06 í 4x50 blandað, 4:19.64 í 4x100 blandað

Landsliðsmenn (1990) 1:33.24 í 4x50 frí, 3:26.31 í 4x100 frí, 1:44.22 í 4x50 blandað

**Hartil føroysk juniormet (25m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 4:21.27 í 400 frí

ATLANTIC AIRWAYS

## NMU 2015 í Jönköping 11. - 12. juli

Vár E. Eidesgaard (2001) og Birni Sigvardsen (1999) úr Havnar Svimjifelag, Sára. R. Nysted úr Suðuroyar Svimjifelag og Rókur Trygvason (2000) úr Reysti umboðaðu Føroyar á Norðurlendsku Meistarastevnuni fyri Ung 2015. Ferðaleiðarar vóru Rúni Gaardbo og Anita Ryggshamar Nysted, og venjari Jón Bjarnason. Stevnan gjørdist besta NMU nakrantíð hjá Føroyum, har serliga Sára skaraði framúr við 5 gull og 1 silvur, umframt at Vár vann silvur afturat gullinum hjá Sáru í 800 frí.

**Føroysk met (50m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 59.37 í 100 frí, 2:07.54 í 200 frí, 5:08.00 í 400 blandað

**Hartil føroysk juniormet (50m)**

Sára R. Nysted (2001), SuSvim 4:31.46 í 400 frí, 9:23.65 í 800 frí

## HM fyri brekað í Glasgow 13. - 19. juli 2015

Krista Mørkøre (1998) úr Ægir umboðaði ÍSB á IPC Swimming World Championships 2015, og setti har fýra persónlig met.

## Portugal Open í Coimbra 23. - 26. juli 2015

Astrið Foldarskarð (1994), Lena Rannváardóttir (1998), Vár E. Eidesgaard (2001) og Óli Mortensen (1996) umboðaðu Havnar Svimjifelag á Portugal Open 2015. Óli vann gull í 800 frí, og bronsu í 1500 frí.

**Føroysk met og juniormet (50m)**

Vár E. Eidesgaard (2001), HS 4:26.87 í 400 frí, 17:32.83 í 1500 frí

## Hartil føroyskt met (50m)

Óli Mortensen (1996), HS 2:08.56 í 200 firvald

**Hartil føroysk juniormet (50m)**

Vár E. Eidesgaard (2001), HS 9:23.40 og 9:18.79 í 800 frí

ATLANTIC AIRWAYS

## Special Olympics World Games í Los Angeles 25. juli - 1. august 2015

Heidi Eliasen og Signa Vár Dávadáttir úr Havnar Svimjifelag umboðaðu saman við Eivindi Toftegaard ÍSB á Special Olympics World Games 2015, og vunnu har 4 silvur og 2 bronsur.



## Ungdómsleikir í Aalborg 31. juli - 3. august 2015

Ungir svimjarar úr Fuglafjarðar Svimjifelag luttóku á Ungdomslegene 2015, og megnaðu har at vinna tilsamans 1 silvur og 2 bronsur. Noah Mneney (2002) og Estir Borðoy (2001) vunnu bronsu í 200 bringu, og Bjartur Nón (2002) silvur í 100 bringu.

## HM 2015 í Kazan 9. - 16. august 2015

Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag, Alvi Hjelm (1996) úr Ægir, og Astrið Foldarskarð (1994) og Lena Rannváardóttir (1998) úr Havnar Svimjifelag umboðaðu Føroyar á HM 2015. Ferðaleiðarar vóru Rókur í Jákupsstovu og Malan V. Bærendsen, og venjari Rui Magalhaes. Pál varð her nr 9 í 1500 frí, og og átti tí at svomið finalu tá ið kinesiski Sun Yang ikki møtti til start. Men har kom eingin fráboðan, og Pál slapp tí ikki at tryggja sær pláss á danska OL-landsliðnum. SSF hevur víst sína ónøgd yvir fyri FINA, og fingið svar at Sun Yang varð brádliga illa fyri.

ATLANTIC AIRWAYS

**Føroyskt met (50m)**

Alvi Hjelm (1996), Ægir 4:33.15 í 400 blandað

## Nordic Open Water í Göteborg 15. - 16. august 2015

Cecilia Wigant Eysturdal umboðaði Føroyar á Norðurlendsku Meistarastevnuni í Open Water svimjing, og megnaði har at vinna silvur á 10 km teininum, umframt bronsu á 5 km.

## HMJ 2015 í Singapore 25. - 30. august 2015

Sára R. Nysted (2001) úr Suðuroyar Svimjifelag og Vár E. Eidesgaard (2001) úr Havnar Svimjifelag umboðaðu Føroyar á HeimMeistarastevnuni fyri Juniorar 2015. Ferðaleiðari var Anna K. Eidesgaard og venjari Jón Bjarnason.

**Føroysk met og juniormet (50m)**

Sára R. Nysted (2001) 2:19.29 í 200 rygg, 2:21.59 í 200 blandað

## NM fyri brekað í Bergen 3. - 4. oktober 2015

Krista Mørkøre (1998) úr Ægir og Ragnvaldur Jensen (1989) umboðaðu ÍSB á Norðurlendsku Meistarastevnuni fyri brekað 2015. Krista vann 1 gull, 2 silvur og 2 bronsur, umframt at seta eini 4 persónlig met. Ragnvaldur vann 2 gull og 1 silvur.

## Nordic Open Masters í Tórshavn 2. - 4. oktober 2015

32 kappingar, 67 feløg, 269 íðkarar og 978 úrslit. Besta úrslit gav 591 FINA stig.

Svimjisamband Føroya skipaði í ár fyri Nordic Open Masters Championships 2015, í Svimjihøllini í Gundadali. Tilsamans 318 svimjarar úr 8 londum luttóku, har tann yngsti var 25 og hin elsti 93. Føroyingar vunnu tilsamans 21 gull, 9 silvur og 22 bronsur, og HS varð mest vinnandi felag.

Stevnan tykiskt at hava eydnast serstakiliga væl, tá ið hugt verður at nøgdseminum hjá teimum luttakandi svimjarum. Men tiltakið var eisini ógvuliga krevjandi fyri tey sum skipaðu fyri og dømdu og hjálptu til. Hesi eiga stórt rós uppiborið, at svimjararnir høvdu eina so góða stevnu.

ATLANTIC AIRWAYS

# Annað virksemi 2014-2015

## NSF

Norðurlendska svimjisambandið NSF hevði sín árliga fund fyri aðalskrivarar og ítróttarstjórar í Reykjavík hin 28. januar 2015. Hesin fundur fyrireikar kalendaran fyri m.a. NM/NJM og NMU; umframt møgulig broytingaruppskot til reglugerð NSFs til fylgjandi aðalfund. Fyri SSF luttók undirritaði Rókur í Jákupsstovu. Eitt høvuðsevni var broyting av junioraldrinum hjá NSF.

Aðalfundur NSF varð hildin í Bergen hin 9. mai 2015. Fyri SSF luttóku undirritaði Rókur í Jákupsstovu og aðalskrivarin Djóni Dalsgarð. Eitt fyri Føroyar týðandi mál her, var at uppmøtti LEN-forsetin Paolo Barelli her váttaði yvirfyri Føroyum og NSF, at LEN vildi taka rokningina fyri flogferð í sambandi við Evropeisku Leikir í Baku, so at vit vóru javnstillað við hinar luttakararnar.

Jon Hestoy umboðaði Føroyar á NSF-fundi í Kazan hin 23. juli 2015, sum í forleingilsi av aðalfundinum í Bergen umrøddi serliga tær reglubroytingar sum FINA ætlaði á eyka-kongressini í Kazan, sama dag. At avtaka aldursmarkið hjá FINA-forsetanum uppeftir, og loyva honum 3 setur.

Jon Hestoy umboðaði eisini Føroyar á NSF-fundi í Riga hin 19. august 2015, sum í forleingilsi av eyka-kongressini í Kazan umrøddi væntaða stríðsval um LEN-forsetapostin í 2016, og harav fylgjandi nevndarsessir.

NSF hevði hartil ein undanfund í Wien hin 9. oktober áðrenn LEN-kongressina hin 10., og aftur um morgunin hin 10. oktober, til at umrøða somu viðurskiftir sum í Riga. Her luttóku Rókur og Hestoy.

Norðurlendska svimjisambandið er sum heild ein væl samansmíðað eind, ið dregur somu línu innan flestu viðurskifti undir LEN og FINA. Ein avbjóðing nú í komandi ári, at fáa best møguligu býti av nevndarsessum í LEN, fyri bæði NSF sum heild og hvørt einstaka norðurland.

## LEN

SSF hevur havt óvanliga nógv samskifti við evropeiska svimjisambandið LEN hetta farna árið, vegna sonevnda CAS-málið, har Føroyar stóðu til at verða útilokaðar frá luttøku á Evropeisku JuniorMeistarastevnuni 2015, tí at LEN hevði avreitt hesa til evropeisku olympisku nevndina EOC.

Nógv fólk hava verið tengd at hesum máli, har serliga sitandi starvsnevnd SSF, fráfarni formaður Jon Hestoy, løgfrøðingur Bjørn Kunoy og starvsnevnd ÍSF við Petur Eliasi Petersen og Sølva R. Hansen eiga stórt rós uppiborið, fyri avrikið sum lukkutíð endaði eftir umstøðunum væl.

Nevnast kunnu hartil navnfrom fólk sum Bjørn Kalsø, mentamálaráðharri, Kaj Leo Holm Johannesen, løgmaður, Niels Nygaard, DOK-forseti, Paolo Barelli, LEN-forseti, Patrick Hickey, EOC-forseti, Thomas Bach, IOC-forseti, og Fríðrikur krúnprinsur.

Málið kravdi nógva orku, men endaði við at føroysku svimjararnir sluppu at luttaka í Baku undir LEN-flagginum, í LEN-høpi tó enn við úrslitunum skrásett sum føroysk.

Støðan var sum so ikki nøktandi fyri Føroyar, í mun til at kunna luttaka í Baku undir føroyskum flaggi. Men hetta var tað frægasta sum vit mettu vit kundu fáa burturúr, soleiðis sum støðan var.

Undirritaði Rókur í Jákupsstovu og Jon Hestoy luttóku á LEN kongressini í Wien hin 9. - 10. oktober 2015, har Jon nýtti høvið til á sjálvari kongressini at taka orðið, og tala at. LEN-forsetin viðgekk óhepnu støðuna, og greiddi m.a. frá hvussu LEN valdi at gjalda fyri flogferðir okkara.

## FINA

Jon Hestoy umboðaði SSF á eyka-kongressini hjá FINA í Kazan hin 23. juli 2015, har avgjørt varð at avtaka aldursmarkið fyri hvussu gamalur FINA-forsetin kann vera, og loyva honum 3 setur.

## Oyggjaleikir

Eyðun Húsgarð varð á Jersey 2015 valdur í teknisku nevndina fyri svimjing á Oyggjaleikum. Hendan nevnd tekur sær av at fyriskipa stevnuna á leikunum, næstu ferð á Gotlandi í 2017.

ATLANTIC AIRWAYS

## Open Water

Jon Hestoy er í FINA nevndunum fyri Open Water bæði í LEN og FINA, og hevur í hesum sambandi eisini verið uttanlanda nakrar ferðir, millum annað til at døma 25 km svimjing í Argentina, og sum trygdarumboð hjá FINA til eina 33 km kapping í Makedónia.

## Býtislykilin hjá ÍSF

Umboðstingið hjá ÍSF hevur í ár brúkt serliga nógva tíð uppá sovnevnda býtislykilin, sum útlutar ta fígging, sum ÍSF fær frá veddingarpengum og Løgtinginum. Fyrst til á tveimum umboðstingum at avgera býtislykilin fyri 2015, og síðani við evnisdøgum og umboðstingum at tilevna ein nýggjan lykil fyri komandi ár. Umboðstingið hevur nú avgjørt at býtið skal vera 50% sum grundgjald og síðani 15% eftir limatali og 35% eftir útreiðslum í roknskapinum. Ein avgerð sum sambært uppskotinum frá ÍSF merkir at Svimjisamband Føroya vil missa 20% av hesum stuðli, til stóran skaða fyri virksemi okkara. SSF er tí sjálvsagt ímóti uppskotinum sum tað fyriliggur, at svimjingin á hendan hátt skal rakast so meint fíggjarliga, hóast tað virksemi og tey úrslit ið vit kunnu vísa á.

## Úrval

Úrval hevði til 2015 fyri fyrstu ferð eitt veruligt umsóknarumfar, har vit í SSF søktu vegna Pál Joensen (1990) úr Suðuroyar Svimjifelag og Óla Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag. Báðir fingu ta upphædd sum vit høvdu søkt um, men hava vit síðani havt eitt ávíst samskifti við ÍSF og Úrval, um hvussu hetta fyrsta umsóknarumfarið varð umsitið.

## Lívbjarging

Lívbjargingarskipan SSF er komin í eina góða legu, og valdi starvsnevndin tí eisini tíðliga í vár at sjóseta eitt átak, til at kunna um okkara tilboð aftaná 2 vandastøður í føroyskari skúlasvimjing. Lívbjargingardómara-dómari okkara Sørin S. Djurhuus var í vár í Danmark og nam sær førleika at undirvísa í lívbjargandi fyrstuhjálp og hjartastartara. Seinni í vár vóru Sørin og Rókur á fundi við Mentamálaráðið, at umrøða, hvussu vit kunnu hjálpa undirvísingarverkinum. Hetta kann gerast eitt sera áhugavert samstarv, um SSF væl at merkja megnar at lyfta umsitingarligu uppgávuna.

ATLANTIC AIRWAYS

## Stuðul

Atlantic Airways hevur nú í nøkur ár verið einsamallur høvuðsstuðul hjá Svimjisambandi Føroya, við endurnýggjaðari avtalu í februar.



## Ægir 40 ár

Ægir fylti 40 ár í ár og hátíðarhelt hetta við veitslu í Klaksvík hin 27. mars 2015.

## Yvirdómaraskeið

SSF skipaði við hjálp frá DGI fyri yvirdómaraskeiði í ÍSF-húsinum hin 10. - 12. apríl 2015. Luttakararnir vóru Eyðun Húsgarð (SSF), Rúni Gaardbo (FLOT), Katja Keles (Reysti), Thurid Kjærbo (SuSvim) og Annika Næs Johannesen (SuSvim).

## Nýggir aldursbólkar

LEN og NSF eru í ferð við at skifta til nýggja bólking av hvat ein juniorur er, og ein sjálvsagdur spurningurin var tí um SSF skuldi broyta sín. Hetta varð gjørt á kalendarafundi 5. september 2015.

## Olympisku Leikir

Undirritaði SSF-formaður Rókur í Jákupsstovu var mánadagin hin 23. mars 2015 á fundi við danska svimjisambandið, Team Danmark og danska OL-stjóran, um donsku kravtíðarskipanina til OL í Rio. Stutt sagt eru krøvini harðari enn tey sum FINA og altjóða olympiska nevndin IOC diktera, og hartil ásett av dønum uttan nakað føroyskt fingramerki.

## Altjóða dómari

Dan Hjelm var í vár úttikin av LEN til at døma á Evropeisku Leikum í Baku. Ein sera áhugaverd uppgáva, ið eisini eina løtu tyktist at kunna vera eyka týðandi til at gera vart við okkum í Baku, meðan tað var ivasamt um nakar føroyskur svimjari slapp at luttaka. Dan røkti uppgávuna til fulnar, við ymiskum álitisstørvum runt kappingarhylin í Baku.

## Landsliðsbúnar

Svimjisamband Føroya gjørdi upp undir Oyggjaleikir á Jersey avtalu við Sportigan um nýggjan landsliðsbúna, sum nú er av tí í svimjihøpi kenda merkinum Arena. Avtalan umfatar eisini møgulig klæðir til lívbjargarar, so at hesi kunnu vera sjónligari í svimjihallunum.

## Bók um Pál

Bretski journalisturin Rod Gilmour gav hin 1. august 2015 út bók um Pál Joensen, kallað “The Pal Effect - A Faroe Islander’s Quest for Swimming Glory”.

ATLANTIC AIRWAYS




## Páls Høll

Grunnurin Páls Høll lat á stórari samkomu í Vági hin 17. oktober 2015 upp Páls Høll, sum er fyrsta føroyska svimjihøll við einum 50 metra langum svimjihyli. Hetta er somuleiðis fyrsta nýbygda høll í Føroyum, síðani svimjihylurin í Søldarfirði lat upp í 1993, og fyrsta nýbygda høll sum kann brúkast til FINA góðkendar kappingar síðani Svimjihøllin í Gundadali lat upp í 1982.

Svimjisambandið fegnast sjálvsagt um hetta megnar avrik, og fyri nú at vit nú kunna venja og kappast á langgeil í Føroyum. Ein náttúrlig avleiðing av hesum er fyrsta FM á langgeil, sum sambært svimjikalendaranum verður í Vági hin 11. - 13. mars 2016.

ATLANTIC AIRWAYS

## Breidd

Tað hevur verið sera avmarkað við breiddartiltøkum hetta farna árið, og øðrum líknandi virksemi, so sum at ferðast runt og vitja feløgini.

Sonevnda slóðaraskipanin hevur ikki verið virkin, har umboð fyri SSF vitjaðu økir við svimjihallum ið ikki høvdu svimjifelag, til um møguligt at leggja lag á.

Starvsnevndin ætlaði at skipa fyri einum felags ráðleggingarvikuskifti í februar/mars 2015, heldur enn at vitja feløgini hvør sær. Hendan ætlan mátti tó sleppast vegna vantandi undirtøku.

Ongar landsliðslegur hava verið, ið annars plagdu at vera jaligar. Hetta er tó ikki er nakað nýtt í mun til støðuna seinastu árini, har úrslitini hjá teimum bestu tó hava verið betri enn nakrantíð.

Sonevndi svimjidagurin hevur heldur ikki verið fyriskipaður, har SSF bjóðaði børnum eisini uttanfyri svimjifeløgini til ein øðrvísi dag við svimjing, spølum og øðrum.

Avbjóðingin er okkara avmarkaða arbeiðsorka, nú nýggja starvsnevndin í fjør yvirtók eitt svimjisamband uttan undirnevndir, so sum svimjinevnd og landsliðsnevnd.

Alt ov nógvar uppgávur hava tí ligið hjá starvsnevndini, sum eftir røttum áttu at verið avgreiddar í slíkum undirnevndum. Og orkan hevur tí ikki rokkið til tað eyka sum vit eisini burdu gjørt.

Tað er okkara vón at hesar undirnevndir nú kunnu fáast at virka aftur, so at starvsnevndin kann miðsavna seg um tær uppgávur sum hon av røttum eigur at taka sær av.

# Niðurløga

Hetta hevur verið eitt serstakliga krevjandi men eisini spennandi ár hjá undirritaða formanni og nýggju starvsnevnd SSF, og hjá øllum teimum sum hava stuðlað okkum í virksemi okkara.

Vit hava meira enn so verið noydd at latið onkra uppgávu liggja, tí at meira átroðkandi uppgávur ikki kundu bíða. Og vit hava tí sikkurt eisini avgreitt okkurt uppá ein ikki so heldigan máta.

Men onkunsvegna er tað allarmesta komið upp á pláss allíkavæl, og onkunsvegna kennist tað eisini sum at tað hóast alt hevur verið tað heila vert.

Tí eingin kann keypa seg til teir sessir sum vit sita í, á fyrstu parkett til ta søguliga bestu ítróttargrein nakrantíð í Føroyum.

Takk til øllum tykkum sum leggja í og stuðla føroyskari svimjing.

Við svimjikvøðu

Toftir 22. oktober 2015

Vegna starvsnevnd SSF

Rókur í Jákupsstovu

Formaður

ATLANTIC AIRWAYS